

# Vit leita eftir 13 eldsálum

Nýggi Frítíðarskúlin í Hoyvík økir um virksemið og hevur tískil brúk fyri 13 eldsálum at byrja 7. august 2007 ella eftir nærri avtalu. Vit fáa fleiri børn eftir summarfrítíðina og verða sostatt umleið 160, børn sum koma at ganga í Frítíðarskúlanumí Hoyvík, í Kirkjukjall-aranum í Hoyvíkar Kirkju og gamla skúla á Hvítanesi

### Søkt verður eftir
- einum varaleiðara til kirkjukjallaran at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 1. august 2007 ella eftir nærri avtalu.
- seks pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 7. august 2007 ella eftir nærri avtalu.
- fimm hjálparfólkum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 7. august 2007 ella eftir nærri avtalu.
- einari køksdamu til kirkjukjallaran at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 7. august 2007.

### Vit leggja dent á
- at frítíðarskúlin er mennandi fyri børnini.
- ítróttarligt og skapandi virksemi innan- og uttandura.

### Vit bjóða
- ein nýggjan frítíðarskúla har tú kanst seta tín dám á stovnin.
- ein frítíðarskúla, har gerandisdagurin í skúla og frítíðarskúla er ein samanhangandi eind.
- ein frítíðarskúla, sum sýnir virðing fyri øllum fakbólkum, bæði pedagogum, lærarum og hjálparfólkum.

### Arbeiði inniber at
- skapa mennandi, avbjóðandi og tryggar karmar fyri børnini
- menna pedagogiska arbeiðið í stovninum, har barnið er miðdepilin
- arbeiða sjálvstøðugt og í toymi

### Vit vænta, at tú
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag.
- hevur royndir at arbeiða við børnum og tekur ábyrgd.
- er kreativ/ur.
- virðir veikar og sterkar síður hjá børnunum.
- tekur lut í at byggja upp ein frítíðarskúla og leggur lunnar undir ein gott samskifti við aðrar samstarvsbólkar.

### Setanarviðurskifti
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### Umsókn
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Frítíðarskúlanum í Hoyvík í hendi seinasta lagi fríggjadagin 22. juni 2007.

### Meiri fæst at vita
um størvini við at venda sær til Levi Mørk, stovnsleiðara á tlf. 210126 ella hygg á heimasíðuna www.123hjemmeside.dk/ftshoyvik

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**




**Kunningarstovurnar kring landið**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | Tel. 302425 | Klaksvík | Tel. 456939 | Tvøroyri | Tel. 372480 | Skopun | Tel 361704 |
| Fuglafjørður | Tel. 444860 | Vágar | Tel. 333455 | Vágur | Tel. 374342 | Vestmanna | Tel 471500 |
| Runavík | Tel. 417060 | Sandoy | Tel. 361836 | Nólsoy | Tel 327060 | | |

**KEMILUX industri**

# GOYMSLUFÓLK

Til goymslu okkara á Hjalla søkja vit eftir m/k til alt vanligt goymsluarbeiði so sum: innkeyp, sølu og logistik.

Dentur verður lagdur á teldukunnleika og góð samstarvsevnir.

Góð løn verður latin.

Skrivlig umsókn verður at senda.

Meira fæst at vita við at ringja til Arna Gunnarsson á tel 210931.







**Mykinesgøta 1 · Postboks 1231**
**FO-110 Tórshavn**
**Tel 350830 · Fax 350831**